# Enn ein ósigur til hvalbingar

**Hvalbingar snávaðu annað vikuskifti á rað, og tað hevur við sær, at Royn liggur á fjórðaplássið, nú farið verður í summarfrí.**

2 DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Royn hevur leingi ligið heilt frammi í oddinum í 2. deild, men við at tapa tvey tey seinastu vikuskiftini, er liðið nú farið aftur á fjórða plássið í deildini.

### Stinnir sumbingar

Leygardagin høvdu hvalbingar vitjan av oyggjafeløgunum úr Sumba, og hendan dystin vunnu gestirnir 2-1.

Sumbingar løgdu seg á odda 1-0 við einum máli, sum ungi Kristian Olsen skoraði. Tað gjørdist eisini 2-0 til gestirnar úr Sumba. Hesaferð var tað Hans Jacob Thomsen, ið var á rætta staðnum fyri Sumba, og tað nyttaði lítið, at Gisli Sveinbjørnsson minkaði um munin fyri Royn til endaliga úrslitið 1-2.

Við sigrinum á hvalbingar hava sumbingar nú ognað sær 14 stig, og tað er tað sama stigatalið sum FS Vágar á fimtaplássið, meðan Royn er á fjórðaplássi við bert einum stigi meiri enn Sumba. TB á oddasessinum hevur 21 stig, og AB er bert tað eina stigið aftan fyri tvøramenninar.

**Royn-Sumba 1-2**
0-1 Kristian Olsen
0-2 Hans Jacob Thomsen
1-2 Gisli Sveinbjørnsson



# TB vann stevnudystin

**Oddaliðið TB vann stevnudystin í Vági fríggjadagin 1-0 ímóti arvafíggindunum úr VB**

2 DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tvøramenn ætla sær at verða við í bestu deildini komandi kappingarár. Síðani kappingin í 2. deild byrjaði í ár, hevur TB ligið á odda, og nú farið verður í summarfrí, er liðið framvegis oddalið í næstbestu fótbóltsdeildini.

### Trupul stevnudystur

Undan dystinum vóru tvøramenn greiðir favorittar, tí teir vóru oddalið, meðan VB var aftast í deildini við einans trimum stigum.

Tað vísti seg tó sum so ofta sæð fyrr í grannauppgerðum og stevnudystum, at dystirnir verða væl tættari enn væntað, og tvøramenn noyddust at stríðast fyri øllum trimum stigunum. Hóast vágbingar fleiri ferðir vóru nær við at skora, so kom bert tað eina málið í dystinum, og tað fekk TB. Ungi Hallur Christiansen, ið seinasta vikuskifti skoraði heilar fýra ferðir ímóti Royn, var aftur hetta vikuskifti á rætta staðnum, og hann gjørdist matchvinnari fyri gestirnar av Tvøroyri.

Seinastu tíggju minuttirnar av dystinum noyddist TB at spæla við tíggju monnum, tí at landsliðsskiparin, Óli Johannesen, fekk reyða kortið, men hóast VB trýsti fyri at fáa útjavnandi málið, eydnaðist tað tvøramonnum at halda tørn og fáa øll trý stigini við norður aftur.

**VB-TB 0-1**
0-1 Hallur Christiansen

# Javnleikur í Leirvík

**Tvey av aftaru liðunum í næstfremstu deildini, LÌF og KÍ, spældu javnt 1-1 í Leirvík leygardagin**

2 DEILD
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Næstbesta liðið hjá KÍ kom leygardagin yvir um fjørðin at vitja leirvíkingar. Við sær í skjáttuni heim aftur høvdu klaksvíkingar tað eina stigið.

### Tamur dystur

Fyrri hálvleikur endaði málleysur, men í seinna hálvleiki kom gongd á málskjótingina. Magni Høgnesen legði heimaliðið á odda 1-0, men Gunnleif Biskopstø var aftur hetta vikuskiftið á blettinum fyri KÍ, og hann javnaði til endaliga úrslitið 1-1. Við javnleikinum leygardagin hevur LÍF nú seks stig á næstaftasta plássið, og tað eru trý fleiri enn VB, sum er aftast.

Klaksvíkingar liggja nummar sjey við níggju stigum, meðan B36 er beint aftan fyri teir við átta stigum. Eitt fitt petti er upp til nummar seks, sum er Sumba við 14 stigum.

**LÍF-KÍ 1-1(0-0)**
1-0 Magni Høgnesen
1-1 Gunnleif Biskopstø


Minst til haldaragjaldið...!




Arjgjavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01
e-mail: post@sosialurin.fo
Sosialurin




# Flogbóltsmenninir gjørdust ov stuttir

**Tað eydnaðist ikki føroyska manslandsliðnum í flogbólti at spæla seg til uppflyting í B-bólkin. Avgerandi dysturin ímóti Luxembourg sunnudagin endaði við føroyskum ósigri, og tí vóru tað móstøðumenninir, ið saman við Kypros, sum rykkja upp í B-bólkin**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Rúni Weihe er hægstur og smashar*
*mynd: Finnur Justinussen*

Føroyingar høvdu góðar vónir undan kappingini í Luxembourg um vikuskifti, har føroysku flogbóltsmenninir kappaðust við fýra aðrar tjóðir um at rykkja upp úr C-bólkinum í B-bólkin. Tvey tey fremstu liðini tryggjaðu sær uppflyting, men føroysku menninir gjørdust akkurát ov stuttir á einum triðjaplássi.

### Góð byrjan

Fyrsti dysturin hjá føroyingunum var fríggjadagin ímóti Skotlandi. Føroyska liðið fekk ikki nakra serliga góða byrjan upp á dystin, og skottar løgdu seg eisini á odda 2-0 í settum, áðrenn føroyska liðið av álvara vaknaði við. Í triðja setti gekk tað eisini eitt striltið at byrja við, men eftir at tað hevði staðið á jøvnum 15-15, tóku føroyingarnir sær um reiggj og vunnu settið 25-17.

Í fjórða settinum vóru føroyingarnir allatíðina yvirlutan og vunnu 25-21. Fimta og avgerandi settið gjørdist sera spennandi, men eftir at tað hevði staðið á jøvnum 9-9, fóru føroyingarnir frá skottunum og vunnu settið 15-11.

Næsti dysturin hjá føroyska landsliðnum í kappingini var ímóti favorittunum av Kypros. Her vísti tað seg skjótt, at kypriotiska liðið var ein ov stórur gloypibiti. Í fyrsta settinum blivu føroyingarnir avsmurdir 25-8, men í teimum báðum næstu settunum gekk eitt sindur betur, tá ið okkara menn taptu ávíkavist 15-25 og 18-25. Kanska besti føroyski leikarin, Rúni Weihe, hevur verið nógv darvaður av skaða í rygginum í farna kappingarári, og hesin sami skaðin gjørdi eisini vart við seg í kappingini í Luxembourg. Tað merkti, at Rúni bert spældi eitt lítið sindur, og harvið var føroyska liðið munandi skert.



### Andorra noyddist at lúta

Sunnumorgunin var næstseinasti dysturin hjá føroyingunum leiktur. Hann var ímóti Andorra, og skuldi føroyska liðið hava nakran sum helst møguleika fyri at leika seg upp í B-bólkin, var neyðugt at vinna á Andorra. Føroyska liðið fekk eina góða byrjan upp á dystin, og liðið vann fyrsta settið 25-17, eftir at teir høvdu lagt seg greitt á odda tíðliga í settinum, og eitt skifti vóru á odda 8-1. Menninir úr lítla fjallalandinum millum Frakland og Spania góvu tó ikki skarvin yvir, og næsta settið endaði við 25-20 sigri til Andorra.

Triðja settið gjørdist eisini sera spennandi, men úrslitið var, at Føroyar vunnu 25-19, eftir at tað annars hevði staðið á jøvnum 15-15. Eisini fjórða settið var sera spennandi, men aftur hesa ferð drógu føroyingarnir longra stráið og vunnu 25-22, og harvið dystin 3-1 í settum.

### Vertirnir vóru ov sterkir

Seinasti og avgerandi dysturin hjá føroyingunum í kappingini var ímóti vertunum úr Luxembourg. Greitt var undan dystinum, at vinnandi liðið fór at rykkja upp í B-bólkin saman við Kypros.

Føroyingarnir høvdu góðar vónir undan hesum dystinum, men tað vísti seg tó, at heimaliðið var eitt vet ov sterkt. Fyrsta settið vann Luxembourg sannførandi 25-11, men næstu settini gekk eitt sindur betur hjá okkara monnum. Hóast Føroyar eitt skifti vóru á odda í øðrum setti, var tað heimaliðið, ið vann 25-16. Nú var neyðugt hjá føroyingunum at vinna triðja settið, um teir skuldu hava lív lagað í dystinum, men tíverri eydnaðist tað ikki okkara monnum at koppa vertunum. Heimaliðið vann triðja settið 25-19, og tískil verður tað Luxembourg, sum saman við Andorra, fer at kappast í B-bólkinum, næstu ferð kapping verður.

Føroyska liðið kann tó verða nøgt við sítt avrik, og vónirnar eiga at verða góðar undan oyggjaleikunum komandi summar. Fleiri av okkara leikarum leika í donskum flogbólti, og tað er týðuligt, at tað er nakað, ið hevur styrkt føroyska landsliðið.



*Nakrir føroyingar taldust millum áskoðararnar til dystirnar í Luxembourg*
*mynd: Finnur Justinussen*